Eftir Jústinus Leivsson Eidesgaard

# Missiónsskrekkur



*Hugni í stóra salinum í Nesvík. Fremsti drongurin eitur Jóhan Heinason Rasmussen. Hann býr í Havn, men er norðuri hjá ommuni og abbanum í Oyndarfirði og ferðast hvørjar ferð høvi býðst. Vit kennast væl.*

*Mynd: Terji Nielsen.*

**Ein sunnudag í februar í ár hekk kirkjuklokkan í Oyndarfirði still. Hon kallaði ikki sálir allar heim til hallar, sum eru orðini, íð eru stoypt á rondini á hesum tungu málmklokku uttan úr heimi. Hetta er aðru ferð so langt nakar veit aftur at siga, at tað er hent, at kirkjuklokkan hevur tagt í Oyndarfirði. Seinast var um hesa tíðina í fjør Orsøkin var tann sama, øll kirkjumanningin saman við bygdafólkinum var savnað á bygdarlegu í Nesvík, háborgini hjá Missiónini til hugna og andaliga fyllu.**

*Jústinus Leivsson Eidesgaard*
*justinus@post.olivant.fo*

Tá íð tu er bygdamaður í Havn, so frættir tú í brotum og sær í brotum hvat hendir í heimbygdini og fær sjálvdan allan samanhangin við og tí snaraði eg norður til Nesvíkar, tá eg var komin til Streymin hetta fríggjakvøldið ávegis norður á Hellurnar at halda vikuskifti.

Legan var longu byrjað. Úti í gongini spældu børn, sum eg kendi, og onnur hvørs andlit vísti hvørjum fólkaslagi tey vóru av. Tey heilsaðu, nevndu meg við navni og eg kendi meg heima beinanvegin.

Inni í stóra salinum sótu oyndfirðingar og supu suppu. Salurin er so stórur, at tað sá tómligt út, men skjótt fekk eg varðhugan av, at meginparturin av bygdini var her. Eg kendi meg enn meira heima, tá mjølbollarnir og heita súpanin hjá Kristjani Gaard í Langagarði byrjaðu at hita í maganum og út í kroppin.

Klokkan var komin nakað út á kvøldið og nú skuldi kvøldandakt haldast. Andaktshaldarin hevði forfall og eg varð biðin um at siga nøkur orð. Eg segði nei. Eg havi slett ikki gingið í missiónshús alt mítt vaksna lív, og eg dugi ikki at siga nakað, sum allarhelst eisini skal innihalda okkurt andaligt, soleiðis bara av handahógvi.

"Bar eg meg nú skeivt at," hugsaði eg. Kom at hugsa um farbróður í Klaksvík, Andrias á Marknagili, sum nú liggur undir grønu torvu. Einaferð segði hann nei til at tala á einum møti, hann varð tyktaður við fleiri árum, áðrenn hann var biðin aftur, og síðan tá hevði hann ongantíð sagt nei.

Verið eg biðin aftur, so sigi eg ja.

### Missiónsfremmandur

Eg eri uppvaksin í Oyndarfirði, ein missiónsbygd við missiónshúsi og sterkari missiónskari viðvenju eini fýra ártíggjur undan at eg varð føddur. Familjan hjá mær í faðirætt var undangongufólk innan missiónina. Abbabeiggi, Jákup í Skúlanum stóð á odda, abbi mín Jústinus var upp í og kona hansara, omma mín, Magnina í Hoygarðshúsi var ein av grundstuðlunum. Í mínum barnaárum vóru vit á barnamøti og eisini á rættuligum missiónsmøtum. Ikki tí vit skuldu, heima hjá okkum var trúarfrælsi, heldur tí vit tímdu, tað var ikki so nógv at fara til í hesi avbyrgdu bygd. Eg minnist møtini bæði langdrigin, hugnalig og spennandi, alt eftir hvør hevði orðið.

So hendi ein broyting, hetta hendi í 1969, sama ár sum mannættin setti fótin á mánan fyri fyrstu ferð. Eg kom út á Strendur at ganga í skúla, samstundis sum ein veking var við at vakna við Skálafjørðin. Jákup Magnussen, ein stórur prúður skallutur sørvingur, mannaði tá nýggja prestagarðin á Gjaranesi. Hann var frontfigurur í vekingarrørsluni, karasmatiskur sum fáur. Kristus var svarið hjá honum og er tað enn hjá yvir einari milliard av heimsins íbúgvum.

Frammanundan hevði eg við øvund eygleitt teir sum vóru eldri enn eg og sum gingu at lesa hjá Follend presti á Nesi. Hann var so gamal, mildur og alfaðirligur, at hann líktist sjálvasta Gudi, tí góða Gudi, sum eg í mínum innara sá fyri mær. Teir róstu honum og søgdu frá hvussu stuttligt tað var at ganga til prest.

Mítt ættarlið skuldi eisini til prest. Hetta var í 1971. Nú var vent í holuni. Undirvisingarcellan var kjallarin í missiónshúsinum á Strondum. Allur leikur var skúgvaður til viks. Her gekk nýggi karismatiski presturin, fyltur av illum heilagum anda og boðaði bál og brand, um vit ikki vendu um í stundini. Sum ein annar kapo gekk hann runt, skallutur við Luthers katekismus í hondini og út greiðaði boðini fyrst við Luthersa útlegging so síðan síni egnu. Lágt var millum loft og gólv, og loftið var málað við hvítari heilblankari oljumáling. Skallin á presti skygdi upp í loftinum og eg hevði varðhugan av, at eg hoyrdi tveir persónar, sum í allar valmeint heit boðaði hóttandi gleðiboðskapin, sum serliga snúði seg um, hvat hendi, um tú ikki í stundini vendi um. Men hvussu vendir man um? Hetta spekuleraðu vit óttafull um um kvøldarnar. Eg hoyrdi tveir prestar, tann vanliga gangandi í missiónskjallaranum og so hin á høvdinum uppi í tí blanka hvíta skyggjandi loftinum. "Tit kalla hann illamann, eg sigi fanin, Satan!" dundi millum okkum bebbaræddu komandi konfirmantum. Eg vendi missiónini bakið beint eftir at eg var fermdur, og havi so at siga ikki vitjað hana aftur fyrr enn nú, eg siti í Nesvík á bygdastevnu fyri oyndfirðingar nú 35 ár seinni. Seinni í lívinum hitti eg aftur Magnussen prest. Vit hittust omanfyri skýggini á veg til Danmarkar mong ár seinni Hann sá út til at hoyra heima her í hesum meira himmakenda umhvørvi. Vit komu at sita